e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

# Reyða Stjørnan til Føroya

*B36 og Gí vóru heppin meðan KÍ kann koma í satt ódnarveður, tá teir skulu royna seg móti fyrrverandi vinnarunum av Europa-Cup kappingini fyri meistarar*



*- Vit ætla undir ongum umstøðum at gera føroyskum fótbólti fyri skommum, sigur Tomislav Sivic um komandi dystirnir móti jugoslaviska stórliðnum*

Jákup Mørk

Kí fekk so nógv tað torførasta mótstøðuliðið, tá UEFA í gjár kastaði lut um, hvussu leikast skal í komandi eruopeisku kappingunum.

**Fyrrverandi meistarar**

Einki er at taka seg aftur í, at tað var KÍ, sum fekk torførasta mótstøðuliðið, tá jugoslaviska navnið, FK Crvena Zvezda, varð drigið úr pottinum.

Crevena Zvezda kann leysliga umsetast til Reyða Stjørna, og tað er í hvussu er eitt navn, sum fótbóltsáhugaðir føroyingar kenna aftur.

Áðrenn jarnmúrurin fall, var Reyða Stjørnan nevnliga millum allarsterkastu lið í Europa, og hóast liðið er viknað nakað síðani hetta, er einki at taka seg aftur í, at talan verður um ein stóran bita hjá klaksvíkingum.

Sum eitt lítið kuriosum kann nevnast, at tað júst er í Reyðu Stjørnu, at KÍ venjarin, Tomislav Sivic, fekk sína fótbóltsuppaling, so á ein hátt kann sigast, at hann kemur heim aftur til altjóða uppgávurnar.

Tá hann í síni tíð spældi á ungdómsliðum felagsins, vóru sjálvandi fleiri komandi stórleikarar millum liðfelagar hansara, og størstur av hesum gjørdist uttan iva Vladimir Jugovic, sum í hesum døgum roynir seg í EM-endaspælinum, umframt at hann í felagshøpi hevur spælt fyri stórlið sum Inter, Juventus, Lazio og Atletico Madrid.

**Venjarin gleðir seg**

Stutt eftir lutakastið fingu vit orðið á Tomislav, og sum vera man, var hann sera spentir til stóru uppgávuna.

- Talan er so avgjørt um nógv tað sterkasta liðið, sum hevur vitjað í Føroyum. Tað eru ikki meira enn níggju ár síðani, at teir vunnu HM fyri feløg, og í veruleikanum hava vit helst ongan møguleika at koma víðari, sigur KÍ venjarin. Víðari sigur hann, at Reyða Stjørna er so avgjørt størsta felagið í Jugoslavia. Teir eru altíð við í fremstu røð, og allir teir bestu ungdómsleikararnir verða eisini savnaðir í felagnum.

Seinastu árini hevur felagið selt eina rúgvu av leikarum, men KÍ venjarin heldur ikki, at hetta ger felagið nógv veikari. – Í fjør nýttu teir árið til at byggja eitt nýtt lið upp, og hóast hetta, so eydnaðist teimum at vinna bæði meistaraheitið og steypakappingina. Ætlanin var tá, at liðið skuldi toppa í ár, so vit fáa tað sera torført.

Til hetta arbeiðið fekk felagið fatur á væl kenda venjaranum, Muslim, sum áður hevur virkað sum venjarin í Fraklandi, har hann hevur havt ábyrgdina av Lens og ikki minst Bordeaux, har hann bygdi upp liðið, sum árið eftir vann franska meistaraheitið.

Sivic hevur tó á ongan hátt uppgivið allar vónir um at fáa eitt líkinda úrslit leygardagin. – Vit skulu minnast til, at føroyska landsliðið tapti 8-1 móti Jugoslavia, so alt undir hetta, kann í veruleikanum góðtakast. Eg ætli mær tó ikki at gevast á hondum, og tað skal vera púra vist, at vit ætla okkum ikki at gera føroyskum fótbólti fyri skommum, sigur Tomislav Sivic at enda.

Fyrri dysturin hjá KÍ verður á heimavølli 12. juli, meðan seinni dysturin verður leiktur 19. juli.

**Fegnir kassameistarar**

Um kassameistararnir hjá silvur- og bronsuvinnarunum frá í fjør, GÍ og B36, fegnaðuats í gjár, so hava teir eisini alla orsøk til hetta.

Fíggjarliga fingu bæði liðini nevnliga eitt sera heppið lutakast friggjadagin. GÍ skal til Svøríkis, har teir skulu takast við IFK Norrkøping, meðan B36 skal til Danmarkar, har AB verður mótstøðuliðið.

**Alt er lættari**

Kjartan Mohr, peningarøkil hjá B36, sigur við Sosialin, at hann er sera fegin um lutakastið.

- Í allar mátar er talan um eitt gott lutakast hjá okkum, sigur Kjartan.

Hann leggur afturat, at fíggjarliga kundi tað nærum ikki verið betri, umframt at hann eisini metir hetta vera eitt sera gott lutakast, um hugt verður eftir ítróttarliga partinum. Hartil kemur, at donsk viðurskiftið eru somikið væl kend í Føroyum, at tað ikki skuldi staðist stórvegis stríð av teimum fyrireikingum, sum ofta eru í samband við slíkar ferðir.

Hjá gøtumonnum er støðan so at siga hin sama. Úr Sveis, har lutakastið var í gjár, frættist annars, at GÍ kundi trekt Aberdeen, og at hetta kanska hevði verið eitt betri mótstøðulið, men alt í alt vóru tey fegin um úrslitið.

Eins og hjá B36 er tað hjá GÍ galdandi, at ein ferð til Svøríkis í allar mátar er løtt at fyriskipa, og ongum nýtist at vera bangin um ógreið viðurskifti, sum kunnu stinga seg upp á vegnum.

Tá vit frættu seinast, stutt undan evstamarki okkara, var enn ikki avgjørt, um nakað skuldi býtast viðvíkjandi heima- og útidystum. Lutakastið hjá UEFA lagaði seg annars soleiðis, at GÍ hevur heimadyst 10. august, meðan B36 spælir heima 14 dagar seinni.

**Støðan, 1 deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 10 | 7 - 2 - 1 | 21 | 10 | 11 | 23 |
| 2 | B36 | 9 | 6 - 0 - 3 | 30 | 13 | 17 | 18 |
| 3 | VB | 9 | 5 - 3 - 1 | 19 | 13 | 6 | 18 |
| 4 | B68 | 9 | 6 - 0 - 3 | 20 | 15 | 5 | 18 |
| 5 | KÍ | 9 | 5 - 2 - 2 | 25 | 7 | 18 | 18 |
| 6 | NSÍ | 9 | 2 - 3 - 4 | 18 | 17 | 1 | 9 |
| 7 | GÍ | 9 | 2 - 2 - 5 | 14 | 19 | -5 | 8 |
| 8 | B71 | 10 | 2 - 2 - 6 | 9 | 15 | -6 | 8 |
| 9 | Sumba | 9 | 2 - 0 - 7 | 6 | 39 | -33 | 6 |
| 10 | FS Vágar | 9 | 1 - 2 - 6 | 9 | 23 | -14 | 5 |

## Dystirnir um vikuskiftið

**1. deild menn, 10. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | FS Vágar-B68 | Niklas á Líðarenda |
| 24.06 | VB-Sumba | Jens Petur Brattalíð |
| 25.06 | GÍ-B36 | Petur Hansen |
| 25.06 | NSÍ-KÍ | Birgir Sondum |

**2. deild menn, 9. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | Royn-TB | Tummas Pauli Olsen |
| 24.06 | KÍ-GÍ | Jákup Martin Kjeld |
| 24.06 | LÍF-B36 | Jón Kári Frederiksen |
| 24.06 | HB-ÍF | Hans F. Hansen |
| 24.06 | EB/Streymur-NSÍ | Eiler Rasmussen |

**3. deild menn, 10. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | FS Vágar-B68 | Suni Johansen |
| 25.06 | ÍF-B36 | Hjalti Gleðisheygg |
| 25.06 | VB-TB | Frits Poulsen |
| 25.06 | AB-B71 | Sunleif Álaberg |
| 25.06 | Skála-KÍ | Rúni Gaardbo |

**1. deild kvinnur 1. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | B36-Skála | Ransin N. Djurhuus |
| 24.06 | VB-NSÍ | Zoran Mancic |
| 24.06 | KÍ-HB | Petur Hansen |



# Spenningurin er størri enn nakrantíð

***Kappróður:*** *Neyvan nakrantíð áður hava so nógvir avbjóðarar verið til fremsta plássið í kappingini millum 10–mannafør, sum tað eru undan jóansøkuróðrinum*

Seinnapartin í dag verður kappróður á jóansøku. Talan er um triðja FM kappróðurin í ár. Talan er eisini um fyrsta FM róðurin í ár 2000, har allar kappingarnar verða á eitt túsund metrum.

Hóast talan bara er m triðju kappingina, so kann tað væl fara at vísa seg, at tað í fleiri kappingum so at siga verður avgjørt, hvørjir FM vinnararnir fara at vera.

Hjá gentunum hevur Frúgvin úr Miðvági vunnið so mikið sannførandi bæði í Klaksvík og í Runavík, at tað er sera ilt at fáa eyga á nakra hóttan á jóansøku og tískil eisini í FM kappingini. Sama ger seg galdandi fyri Jarnbard í kappingini millum 6–mannaførini við kvinnum, Tjaldrið í dreingjakappingini og Argjabátin í kappingini millum 8–mannafør.

Hvessingur hevur vunnið báðar róðrarnar í kappingini millum 6–mannafør við monnum, og teir í Hvalvík og Streymnesi eru upplagdir favorittar í Vági í dag. Men tað skal takast við, at sjálvt um Hvessingur hevur vunnið, so hava teir fingið góða kapping frá Hósvíkingi. Á norðoyarstevnu var Kollfirðingur væl við, og á Skálafjørðinum var Strálan av Stronum væl við.

Havast skal í huga, at bæði 6–mannaførini við monnum og 8–mannaførini, sum higartil hava kappast á 1500 metrum, í dag fara at rógva á eitt túsund metrum. Hetta kann fara at hava ávirkan á úrslitini, ikki minst hjá 6–mannaførunum, har kappingin hevur verið stór, og har Hvessingur ikki hevur verið fremstur á fyrsta teininum.

**Velduga kappingin**

Um tað hevur komið fyri áður, tora vit ikki at leggja høvdið á blokkin fyri, men tað er í hvussu so er langt síðani, at kappingin millum 10–mannaførini hevur verið so opin, sum hon tykist vera, tá bátarnir seint seinnapartin í dag fara at kappast fyri triðju ferð í ár.

Vestmenningur vann á norðoyarstevnu, og Nólsoyingur vann á skálafjarðarstevnu. Hesir báðir bátarnir eru uppløgd evni til at vinna í Vági. Men tað eru eisini aðrir bátar, sum mugu metast at hava góðan møguleika at vinna. Nýggi Havnarbáturin var næstfremstur bæði í Klaksvík og í Runavík. Í báðum róðrunum var hann fremstur ein stóran part av róðrarteininum, men tað kiksaði í endaspurtinum. Spurninguirn er so, hvussu tað fer at roynast, tá teinurin verður eitt túsund metrar. Í Klaksvík róðu 10–mannaførini 1500 metrar, og í Runavík róðu tey 2000 metrar.

Eysturoyingur hevur ikki staðið seg væl higartil. Teir hava havt trupulleikar bæði undan norðoyarstevnu og undan skálafjarðarstevnuni. Nú hava teir so at siga havt eina friðarliga viku at venja í. Styrkin hjá teimum bæði í fjør og í fyrraárið var, at teir megnaðu at leggja seg fram um hinar bátarnar beinanvegin. Tað hava teir ikki megnað í ár. Um teir megna tað í Vági, so verða teir ivaleyst vandamiklir fyri hinar bátarnar.

Í blaðnum í gjár søgdu vágbingar, at teir hava ikki avskrivað møguleikan at vera við í kappingini um fremsta plássið í heimasjógvi. Og tí kunnu vit bara staðfesta, at tað er so spennandi og opið, sum tey neyvan áður hevur verið í kappingini millum størstu bátarnar.

JH



*Verða tað aftur nólsoyingar, sum kunnu rópa sigursrópini leygardagin? Spenningurin í ár tykist verða størstur hjá 10-mannaførunum, har fleiri bátar eru um boðið*

# KÍ ætlar at siga takk fyri seinast

*Klaksvíkingar eru svangir at hevna óvæntaða tapið, tá NSÍ var í Klaksvík í fyrsta umfarinum*

Tað var ein øgiligur skelkur fyri KÍ og nógvu viðhaldsfólkini hjá teimum, tá NSÍ 24. apríl fór úr Klaksvík við øllum trimum stigunum. Trygvi Mortensen og hansara menn høvdu lært av uppgerðunum í bólkaumfarinum í steypakappingini. Teir spældu skjótt og flatt, og teir høvdu nógvar málmøguleikar umframt tann, sum Jónstein Petersen gjørdi nyttu burturúr. 1–0 sigurin hjá NSÍ var tann fyrsti nakrantíð í landskappingardysti í Klaksvík.

Síðani tá hevur gongdin hjá NSÍ og KI verið upp og niður. Hjá KÍ gekk fyrst skeiva vegin. Teir taptu í Gundadali móti HB, teir spældu javnt á heimavølli móti VB og á útivølli móti GÍ, men frá tí at teir 28. mai vunnu í Gundadali ímóti B36, hava teir í fýra dystum fingið fulla úrtøku.

Hjá NSÍ hevur tað hilnast illa. Eftir sigurin í Klaksvík hava teir bara vunnið í Sumba. Teir hava spælt javnt í Vágum og á heimavølli ímóti HB B71, og so hava teir tapt fýra ferðir. Tí kunnu vit siga, at annað liðið, sum spælir í Runavík í morgin, er fyri uppgangandi, meðan hitt sær fram til løtuna, tá gongdin fer at venda rætta vegin.

**Nógv á skránni**

Klaksvíkingar eru sjálvsagt uppsettir at fáa trý stig móti NSÍ. HB hevur við sigri í framskundaða dystinum syrgt fyri leggja trýst á hini liðini, sum ætla sær at vinna FM. KÍ er eitt teirra.

Í Klaksvík hevur nógv verið á skránni í vikuni. Í sambandi við Europa Cup hava teir tikið myndir av stóra 1. deildarhópinum, og so hava teir havt vitjan av kendum og populerum monnum. Todi Jónsson og Jákup Mikkelsen hava báðir verið heima í summarfrí, og teir hava vant í barndómsfelagnum.

Niclas Niclasen, sum var leikbannaður móti FS Vágum, er tøkur aftur. Marek Wierzbicki var fyrstu ferð í hesi vikuni og vandi hóskvøldið. Kristian á Lakjuni er plágaður av toygnaðum liðbondum í fótliðnum. Hann er ivasamur. Símun Waag Høgnesen hevur gingið við brotnum beini. Hann var fyrstu ferð og vandi hóskvøldið.

Í 1998 endaði uppgerðin í Runavík málleys. Annars hevur KÍ havt gott tak á tey seinnu árini. Teir hava vunnið í 1999, 1997 og í 1995 – 3–1, 2–0 og 2–1.

**Nógv við lækna at gera**

NSÍ hevur tvær ferðir tapt við tveimum málum. Hini tapini hava verið við einum máli. Teir eru á sætta plássi, meðan KÍ er á fimta plássi. Men tað er stórur munur á úrtøkuni í fyrru helvt av landskappingini.

Rúni Joensen, sum noyddist at taka seg úr dystinum móti B71, er klárur aftur. Hann vandi fyrstu ferð hóskvøldið. Kári Hansen vardi málið síðstu løtuna móti B71. Í morgin verður hann hvørki í verjuni ella í málinum, tí hann er leikbannaður.

Í gjár klokkan hálvgum trý skuldi álopsspælarin Christian Høgni Jacobsen undir skurð í Klaksvík. Hann hevur leingi havt trupulleikar við knænum. Mortan Hansen er ein annar álopsmaður, sum hevur havt trupulleikar við knænum. Eisini hann er so smátt farin at venja aftur.

Síðsti heimasigurin hjá NSÍ móti KÍ var í 1994. Tá var úrslitið 2–1.

JH

# B68-verjan er illa fyri

*Hjá FS Vágum eru allir spælararnir tøkir, tá teir skulu royna at lyfta seg av aftasta plássinum*

Seinnapartin í dag klokkan 17 hava B68 og FS Vágar fingið summarfrí. Tá verður greitt, um tað hevur eydnast B68 at vinna triðja sigurin á útivølli á rað (bæði móti HB og GÍ hava teir verið hepnir), ella um tað fer at eydnast FS Vágar at lyfta seg av aftasta plássinum. FS Vágar hevur røkt aftasta plássið øll tey fyrstu níggju umførini. Men í heimadystinum næstsíðsta vikuskifti vunnu teir á GÍ og otaðu seg upp undir sumbingarnar.

Hjá B68 hava Jan C. Dam og Arnbjørn Danielsen verið stuðlar í miðverjuni. Í Gøtu síðsta sunnudag var Jan C. Dam ikki við, og í gjár var tað ein møguleiki, at hvørki Jan ella Arnbjørn verða førir fyri at spæla í Sørvági í dag. Jan hevur ikki vant tær síðstu vikurnar, tí hann hevur trupulleikar niðarlaga í rygginum, men teir vóna, at hann verður førur fyri at hjálpa til í dag. Arnbjørn Danielsen fekk týskvøldið eitt hald í ryggin undir venjing. Síðani tá hevur hann ikki vant. Tað hevur gingið rætta vegin, men í gjár var ikki greitt, um hann verður førur fyri at spæla í dag.

Í fyrsta umfarinum vann B68 2–0 á Svangaskarði móti vágaliðnum, men toftamenn hildu tað vera sera strevið at fáa stigini til høldar.

Merkisvert er tað, at toppskjúttin í bestu deildini, Súni Fríði Johannesen, í fyrru hálvu av hesum kappingarárinum hevur megnað í miðal at skora eitt mál í hvørjum dysti. Fyri B68 hevur tað stóran týdning, um toppskjúttin aftur hesa ferð megnar at vísa, hvussu vandamikil hann er.

**Allir klárir**

Í Vágum eru allir spælararnir tøkir. Darius var leikbannaður, tá teir vóru í Klaksvík, og Emil Hentze og Sjúrður Ellefsen vóru skaddir, men teir eru allir tøkir aftur.

Í Vágum høvdu teir í ár roknað við einari øðrvísi støðu enn henni, sum teirra lið higartil hevur verið í, men teir siga seg ikki hava mist mótið. Teir halda, at í flestu dystunum hava teir verið tætt við, og teir rokna avgjørt við møguleikanum at fáa stig seinnapartin í dag.

B68 hevur vunnið allar tríggjar landskappingardystirnar í Vágum. Í 1995 vunnu teir 5–1, í 1996 1–0, og í 1997, tá FS Vágar flutti niður í 2. deild, var úrslitið 2–1 til B68.

JH

**All-Inter Runavík**

**Fólk søkist at reka krambúð okkara í Runavík.**

**Vit vænta at tú ert sjálvstøðug/ur umframt at tú ert virkin í ítrótti.**

**Løn sambært avtalu.**

**Skrivlig umsókn verður at senda til:**

**All-Inter**
**Postboks 350**
**700 Klaksvík**

Sosialurin - 311820